# Bilar

Nr. 235 • mikudagur • 7. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

### Chrysler PT Cruiser 2,2 CRD Touring

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,2 litur 4 syl. diesel við 150 hk v. commonrail og turbo |
| 0-100 km/t | 12,1 sek |
| Oljunýtsla | 14,9 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 428,8 cm |
| Breidd | 174,8 cm |
| Hædd | 160,1 cm |
| Vekt | 1.475 kg |
| Viðførisrúm | 538 litrar |
| Søluumboð | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |

Chrysler PT Cruiser:

# Fólk verða í góðum lag av bilinum


PT Cruiser líkist einum bili frá 40-unum við ordiligum skermum og trinbrettum

**Fyri tann sum vil verða sæddur í ferðsluni, er Chrysler PT Cruiser ein ynskidreymur, bilurin er bæði nútímans og gamaldags, samstundis sum hann er ein rúmligur og væl útgjørdur familjubilur**

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Amerikanski familjubilurin Chrysler PT Cruiser er ein av teimum mest sermerktu á marknaðinum úti í heimi. Bilurin, sum upprunaligur varð gjørdur sum ein konseptbilur, vekjur undran og áhuga hvar hann kemur. PT Cruiser kom fyrstu ferð á marknaðin í 1999.

Chrysler hava seinnu árini verið sera djarvir, tá tað snýr seg um at gera bilmodell, sum bróta við vanliga vanahugsan. PT Cruiser líkist einum bili frá 40-unum við ordiligum skermum og trinbrettum. Eisini fæst nógv ymisk eykaútgerð til bilin, soleiðis at hann kann koma at sígga uppaftur eldri og meira charmerandi út - óteljandi møguleikar.


*Chrysler PT Cruiser er ein av teimum mest sermerktu á marknaðinum úti í heimi. Bilurin kom fyrstu ferð á marknaðin í 1999*

Her hjá okkum hava vit sæð ógvuliga lítið til PT Cruiser, meðan teir hava verið nógv seldir í fleiri av grannalondum okkara - eisini í Danmark. Men nú sær tað út til, at gongd er við at koma á søluna.

Tað geniala við einum bili sum PT Cruiser er, at samstundis sum hann er sermerktur og sær út av nógvum, er hann ikki størri enn ein vanligur MPV. Og talan er í veruleikanum um ein um ein væl útgjørdan og rúmligan 5-persóna familjubil, har øll í bilinum sita høgt og hava gott útsýni.

Fólk, sum koyra PT Cruiser, siga, at næstan øll sum tey møta hava onkra viðmerking um bilin, summi siga, at tey blíva í góðum lag, bara tey síggja bilin.


*Nýggja instrumentborðið er nakað broytt við alu-look panelum og øðrum smærri broytingum*

Hesin nýggjasti PT Cruiser hevur fingið eina "faclift" í mun til teir undanfarnu við t.d. nýggjum lyktum og kúfangarum. Eisini innan er instrumentborðið broytt við meira av alu-look panelum og øðrum smærri broytingum.

PT Cruiser fæst í fleiri ymiskum motorum. Bensinmotorarnir fáast úr 1,6 litur við 116 hk til 2,4 litur við 143 hk, 2.4 GT TURBO 223HK, meðan 2,2 litur dieselmotorurin fæst við 150 hk.